LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Heilsumálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Tórshavn, tann 3. februar 2023
J.Nr.: LUM-16- 22/22424-7
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr. 22/22741

# Álit

## viðvíkjandi fyrisitingarligu mannagongdini, tá Etiska ráðið varð sett í 2022

Løgtingsins umboðsmaður hevur, sambært § 6, stk. 5 í umboðsmanslógini (løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020), avgjørt at taka mál upp av egnum ávum viðvíkjandi fyrisitingarligu mannagongdini hjá Heilsumálaráðnum, tá nýtt Etiskt ráð var sett á heysti 2022.

### Málsgongd

Eftir áheitan frá Løgtingsins umboðsmanni sendi Heilsumálaráðið umboðsmanninum skjølini í málinum viðvíkjandi setan av Etiska ráðnum 2022 – 2026.

Við skrivi, dagfest 14. desember 2022, sendi umboðsmaðurin Heilsumálaráðnum soljóðandi skriv:

> “
>
> ...
>
> Við gjøgnumgongd av skjølunum í málinum undraðist eg yvir fyrisitingarligu mannagongdina hjá Heilsumálaráðnum í sambandi við setan av Etiska ráðnum.
>
> Sambært § 6, stk. 5 í umboðsmanslógini (løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020) kann umboðsmaðurin taka mál upp av egnum ávum.
>
> Vísandi til omanfyristandandi havi eg gjørt av at biðja Heilsumálaráðið greiða mær nærri frá fyrisitingarligu mannagongdini í sambandi við setan av Etiska ráðnum.

Sambært § 6, stk. 3 og 5 í løgtingslóg um Etiskt ráð skulu tey, ið verða tilnevnd í Etiska ráðið, hava innlit í etisk, mentanarlig, samfelagslig og faklig viðurskifti, ið hava týdning fyri ráðsins virki. Landsstýrismaðurin í heilsumálum skal tryggja, at Etiska ráðið verður samansett við fólki við fjølbroyttum útbúgvingum og royndum, og at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðaðir.

Í hesum sambandi fari eg at biðja Heilsumálaráðið greiða mær frá eftirfylgjandi:

1. Í skjølunum í málinum sæst, at tilmælini frá teimum ymisku pørtunum til landsstýrismannin í heilsumálum um limir til Etiska ráðið ongar grundgevingar hava fyri, hví teir ymisku partarnir skjóta upp júst hesar persónarnar. Bara tilmælið frá landsstýrismanninum í almannamálum hevur eina stutta lýsing av útbúgving og arbeiðsroyndum hjá teimum persónum, hann skjýtur upp.

   Eg fari at biðja Heilsumálaráðið greiða mær frá, hví Heilsumálaráðið ikki hevur biðið teir ymisku partarnar, sum skulu koma við tilmælum um limir til Etiska ráðið, lýsa, hvørjar førleikar teir persónar, sum verða skotnir upp, hava til júst hesa uppgávuna.

2. Í skjølunum í málinum sæst, at tilmælið frá umsitingini í Heilsumálaráðnum til landsstýrismannin í heilsumálum er ein listi yvir teir persónar, sum teir ymisku partarnar hava skotið upp til limir í Etiska ráðnum. Mælt verður til at seta Etiska ráðið av nýggjum og miða ímóti, at 3 limir verða sitandi. Tilmælið inniheldur onga ráðgeving til landsstýrismannin um, hvørjir av persónunum, sum eru skotnir upp, eru best skikkaðir, og hvussu Etiska ráðið eigur at verða samansett.

   Eg fari at biðja Heilsumálaráðið greiða mær frá, hví tilmælið frá umsitingini í Heilsumálaráðnum til landsstýrismannin í heilsumálum ikki ráðgevur landsstýrismannin um, hvørjir av persónunum, sum eru skotnir upp, eru best skikkaðir at sita í Etiska ráðnum, og við hvørjum persónum Etiska ráðið best hóskandi verður samansett.

3. Í skjølunum sæst, at í uppriti frá fundi við landsstýrismannin í heilsumálum tann 30. august 2022 um val av nýggjum limum til Etiska ráðið, er listi yvir nývaldu limirnir í Etiska ráðnum. Í uppritinum er ongin grundgeving fyri, hví júst hesir limirnir eru valdir, og hví Etiska ráðið verður samansett júst soleiðis, sum tað verður.

   Eg fari at biðja Heilsumálaráðið greiða mær frá, hví ongin grundgeving er fyri, hví landsstýrismaðurin í heilsumálum velur júst hesar limirnar í Etiska ráðið, og hví Etiska ráðið verður samansett júst soleiðis, sum tað verður.

Biðið verður um, at frágreiðingin frá Heilsumálaráðnum verður mær í hendi innan 13. januar 2023."

Tann 9. januar 2023 sendi Heilsumálaráðið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

"**Viðvíkjandi fyrisitingarligu mannagongdini í sambandi við setan av Etiska ráðnum 2022-2026**

Við skrivi, dagfest 14. desember 2022, ynskir Løgtingsins umboðsmaður (hereftir LUM) at fáa frágreiðing um fyrisitingarligu mannagongdina í sambandi við setan av Etiska ráðnum 2022- 2026. LUM hevur sett 3 ítøkiligar spurningar hesum viðvíkjandi, og verða teir svaraðir niðanfyri.

Fyrst kann sigast, at Heilsumálaráðið heldur seg til almenna setanarpolitikkin hjá Fíggjarmálaráðnum - og tær fyrisitingarligu mannagongdir sum har eru orðaðar - tá ið størv skulu setast, har antin Heilsumálaráðið ella landsstýrismaðurin er setanarmyndugleiki. Endamálið við setanarpolitikkinum er m.a.:"...at *tryggja, at stovnurin setir umsøkjara, ið, úr einum heildarsjónarmiði, er best egnaður til starvið. Setanarpolitikkurin skal eisini tryggja, at umsøkjarar, sum ikki fáa starv, kunnu vera vísir í, at avgerðin er farin fram á rættan og rættvísan hátt".* Eisini er tað ásett í setanarpolitikkinum, at *"...starvssetanir eru at meta sum fyrisitingarligar avgerðir og eru tí eisini fevndar av ásetingunum í fyrisitingarlógini um eitt nú svarfreist og grundgeving".* Til samanberingar er ongin almennur politikkur - ella fyrisitingarligar mannagongdir – galdandi, tá ið ráð og nevndir skulu setast av landsstýrinum.

Heilsumálaráðið hevur heldur ikki havt til siðvenju, og metir heldur ikki at tað er rætt, at fylgja setanarpolitikkinum, tá ið ráð og nevndir skulu setast. Tí hevur ráðið ikki biðið um t.d. grundgevingar, lívsrensl og/ella havt samrøður við tey sum eru tilnevnd í Etiska ráðið fyri at koma við einum tilmæli um, hvønn Heilsumálaráðið metir er best skikkaður til at sita í ráðnum.

Um tað verður samanborið við eina starvssetan, hevur landsstýrismaðurin í hesum føri havt eitt størri frælsi til at velja teir limir, sum hann sambært lógini skal velja í ráðið. Uppgávan hjá Heilsumálaráðnum hevur harafturímóti verið at ráðgivið landsstýrismanninum í tann mun hetta hevur verið neyðugt og í hesum sambandi tryggja, at ásetingarnar í lógini verða hildnar. Heilsumálaráðið sendi, sum kunnugt, á vári 2022 skriv til teir ymisku partarnar um at koma við tilmæli um val av limum til Etiska ráðið. Í skrivinum stóð m.a. soljóðandi *"Tey, ið verða tilnevnd í Etiska ráðið, skulu hava innlit i etisk, mentanarlig, samfelagslig og faklig viðurskifti, ið hava týdning fyri ráðsins virki. Etiska ráðið hevur til endamáls at fremja og styrkja kjak og vitan um etiskar spurningar, ið knýta seg til heilsufakligt virksemi á heilsuøkinum, almannaøkinum og kommunala økinum."* Heilsumálaráðið metir sostatt, at teir ymisku partarnir, ið skuldi koma við tilmæli um limir til Etiska ráðið, hava verið greiðir yvir, at persónarnir í uppskoti skuldu hava ávísar førleikar, og tí bað Heilsumálaráðið ikki um nærri grundgeving fyri, hví júst hesir persónar vóru í uppskoti.

Sambært § 6, stk. 2 í lógini um Etiskt ráð er tað landsstýrismaðurin í heilsumálum, sum setur Etiska ráðið. Heilsumálaráðið hevur tí ikki havt til siðvenju at ráðgeva landsstýrismanninum í, hvørjar persónar hann ítøkiliga skal velja fyri, at ráðið verður best hóskandi samansett. Havast skal eisini í huga, at ein sessur í Etiska ráðnum ikki kann samanberast við eina starvssetan, har tað er ein setanarbólkur, ið ger tilmælið um, hvør umsøkjari er best skikkaður til sessin.

Sum nevnt omanfyri, er tað, sambært § 6, stk. 2 í lógini, landsstýrismaðurin í heilsumálum, sum setur Etiska ráðið. Heilsumálaráðið metti tað ikki vera neyðugt, at uppritið dagfest 30. august 2022 skuldi innihalda grundgeving fyri, hví landsstýrismaðurin valdi júst teir limir, sum hann valdi, og hví Etiska ráðið bleiv samansett júst soleiðis, sum tað bleiv. Landsstýrismaðurin avger sjálvur, hvørjar limir hann velur út frá teimum innkomnu tilmælunum, og tað stendur ongastaðni í lógini um Etiska ráðið, at landsstýrismaðurin skal grundgeva fyri sínum vali. Sambært § 6, stk. 3 í lógini skulu tey tilnevndu hava innlit í etisk, mentanarlig, samfelagslig og faklig viðurskifti, og metir Heilsumálaráðið, at landsstýrismaðurin við sínum vali av nýggjum limum hevur hildið seg innanfyri hesi krøv, samstundis sum hann hevur hildið seg innanfyri ásetingarnar í lógini.

Samanumtikið metir Heilsumálaráðið, at fyrisitingarliga mannagongdin í sambandi við setan av Etiska ráðnum 2022-2026 er farin fram í samsvar við lógina um Etiskt ráð."

Tann 16. januar 2023 boðaði umboðsmaðurin Heilsumálaráðnum frá, at av tí at tað ikki var mett at vera neyðugt við framhaldandi hoyring, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

**Lóggávan**

Sambært § 3 í løgtingslóg um Etiskt ráð (løgtingslóg nr. 70 frá 29. mai 2017 um Etiskt ráð) eru virkisøki og uppgávur hjá Etiska ráðnum hesar:

> "**§ 3.** Etiska ráðið eygleiðir gongdina í samfelagnum og tekur, av egnum ávum, til viðgerðar almennar og prinsipiellar etiskar spurningar um gransking í og nýtslu av biotøknifrøði og ílegutøknifrøði, ið hevur ávirkan á menniskju.
> *Stk. 2.* Harumframt kann ráðið taka til viðgerðar aðrar etiskar spurningar, sum knýta seg til heilsufakligt virksemi á heilsuøkinum, almannaøkinum og kommunala økinum og etiskar spurningar um lívfrøðiliga, medisinska gransking viðvíkjandi menniskjum.

Sambært § 6 verður ráðið skipað soleiðis:

> "**§ 6.** Í Etiska ráðnum eru 9 limir, ið verða settir fyri 4 ár í senn. Limirnir verða sitandi í ráðnum, til nýggir limir eru tilnevndir.
> *Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum setur ráðið eftir hesum reglum:
> 1) Landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum tilnevnir formannin í ráðnum, umframt ein lim.
> 2) Landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum tilnevnir ein lim eftir tilmæli frá landsstýrismanninum í almannamálum, ein lim eftir tilmæli frá Kommunufelagnum, ein lim eftir tilmæli frá landsstýrismanninum í vinnumálum, ein lim eftir tilmæli frá landsstýrismanninum í kirkjumálum og tríggjar limir eftir tilmæli frá politisku flokkunum, ið hava umboð á Løgtingi.
>
> *Stk. 3.* Tey, ið verða tilnevnd í ráðið sambært stk. 2, nr. 1 og 2, skulu hava innlit í etisk, mentanarlig, samfelagslig og faklig viðurskifti, ið hava týdning fyri ráðsins virki.
> *Stk. 4.* Limir í ráðnum kunnu ikki sita á Løgtingi ella í kommunustýri.
> *Stk. 5.* Landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum skal tryggja, at ráðið verður samansett við fólki við fjølbroyttum útbúgvingum og royndum og at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðað.
> *Stk. 6.* Tá ið ráðið verður sett av nýggjum, verður miðað ímóti, at í minsta lagi 3 limir frá undanfarna valskeiði verða sitandi eitt valskeið afturat. Limir kunnu verða settir av nýggjum eina ferð.
>
> ..."

Sambært almennu viðmerkingunum til § 6 skulu tey, ið verða tilnevnd í Etiska ráðið, hava innlit í etisk, mentanarlig, samfelagslig og faklig viðurskifti, ið hava týdning fyri ráðsins virki. Landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum skal tryggja, at bæði fakfólk og leikfólk eru umboðað, og at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðaðir í ráðnum. Sambært almennu viðmerkingunum til § 6 verður hugsað um fakfólk, tá ið talan er um fólk, ið starvast innan økið, t.d. granskarar á økinum, meðan hugsað verður um leikfólk, tá ið talan er um fólk við aðrari útbúgving, t.d. lærarar, prestar, akademikarar v.m.

Sambært serligu viðmerkingunum til § 6 hevur landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum heimildina at seta ráðið, meðan onnur landsstýrisfólk hava heimild at gera tilmæli til limir í ráðið. Landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum setur Etiska ráðið soleiðis:

> “Landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum tilnevnir formannin í ráðnum. Hugsað verður um, at landsstýrismaðurin tilnevnir ein persón, ið hevur innlit í etisk, mentanarlig, samfelagslig og faklig viðurskifti, herundir átrúnaðarlig og sosial viðurskifti, ið hava týdning fyri ráðsins virki, sum hevur royndir í at seta etisk viðurskifti á dagsskránna og at úttala seg um etisk viðurskifti.
>
> Landsstýrismaðurin tilnevnir harumframt ein lim. Hugsað verður um, at hesin limur m.a. skal hava heilsufakligan kunnleika til gransking og viðgerð innan læknafrøði, og til gransking og viðgerð innan heilsuøkið. Mett verður, at tað er neyðugt at hava eitt heilsustarvsfólk við læknafakligari bakgrund í ráðnum, av tí at stórur partur av tí granskingarvirksemi, ið fer fram viðvíkjandi lív- og ílegutøkni innan heilsuøkið, verður gjørt av læknum.
>
> Landsstýrismaðurin í almannamálum mælir til ein lim í ráðið. Hugsað verður um, at hesin limur hevur kunnleika innan heilsufakligt virksemi á almannaøkinum og/ella sosial- og samfelagsvísind á almannaøkinum.
>
> Kommunufelagið mælir til ein lim í ráðið. Hugsað verður um, at hesin limur hevur kunnleika innan heilsufakligt virksemi innan kommunala geiran, herundir á eldraøkinum.
>
> Landsstýrismaðurin í vinnumálum mælir til ein lim í ráðið. Hugsað verður um, at hesin limur hevur kunnleika til granskingarøkið.
>
> Landsstýrismaðurin í kirkjumálum mælir til ein lim í ráðið. Hugsað verður um, at hesin limur er prestur.
>
> Politisku flokkarnir, ið hava umboðan á Løgtingi, tilmæla tríggjar limir í ráðið.”

Sambært serligu viðmerkingunum til § 6 skulu tey, ið verða vald í Etiska ráðið, hava innlit í etisk, mentanarlig, samfelagslig og faklig viðurskifti, herundir átrúnaðarlig viðurskifti, ið hava týdning fyri ráðsins virki. Limir í ráðnum skulu ikki sita á Løgtingi ella í kommunustýri.

Serligu viðmerkingarnar til § 6 siga víðari, at tá landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum setur ráðið, skal hann tryggja, at ráðið verður samansett við fjølbroyttum útbúgvingum og royndum, og at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðaðir í ráðnum. Víst verður á, at til ber at fáa eina fjølbroytta umboðan av førleikum í ráðið, og at partarnir, sum mæla til limir, koma við fleiri uppskotum, enn tað er tørvur á, soleiðis at landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum hevur fleiri uppskot at velja ímillum.

Í serligu viðmerkingunum til § 6 verður nágreinað, at við “fjølbroyttum útbúgvingum og royndum” verður hugsað um eitt nú granskarar á heilsuøkinum, læknar, sjúkrarøktarfrøðingar, sálarfrøðingar og onnur heilsustarvsfólk. Eisini verður hugsað um aðrar útbúgvingar, eitt nú lærarar, skipsførarar, prestar, filosoffar, samfelagsfrøðingar, akademikarar, ið hava innlit í etisk, mentanarlig-, átrúnaðarlig-, samfelagslig viðurskifti, ið hava týdning fyri ráðsins virki, og

sum hava luttikið alment í kjakinum viðvíkjandi etiskum spurningum. Limir skulu lúka treytirnar í lógarinnar § 6, stk. 3.

Serligu viðmerkingarnar til § 6 vísa á, at um landsstýrismaðurin ikki fær sett umleið eins nógvar limir av báðum kynum ella ikki fær ráðið samansett við nóg fjølbroyttum førleikum, ber til hjá landsstýrismanninum, við heimild í § 6, stk. 4, (*eigur helst at vera § 6, stk. 5, mín viðmerking*) at venda sær aftur til tey, ið skulu tilmæla limir í ráðið, við umbøn um, at (*annar, mín viðmerking*) limur verður tilmæltur, soleiðis at hesin trupulleiki kann verða loystur.

Viðvíkjandi afturvali av ráðslimum verður, sambært serligu viðmerkingunum til § 6, skotin upp ein rotatiónsskipan, sum tryggjar, at ikki øll manningin fer frá ella ikki verður afturvald í senn. Hetta fyri at tryggja framhaldni í arbeiðinum hjá ráðnum. Tí verður skotið upp, at 4. hvørt ár, tá limir skulu setast ella setast av nýggjum í ráðið, skulu í minsta lagi 3 limir frá undanfarna valskeiði verða sitandi eitt valskeið afturat. Limir í ráðnum kunnu verða settir av nýggjum eina ferð, t.v.s. at til ber hjá limum at sita í ráðnum 8 ár út í eitt.

**Niðurstøða**
Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um fyrisitingarligu mannagongdina hjá Heilsumálaráðnum í sambandi við setan av Etiska ráðnum 2022 - 2026. Eg viðgeri ikki, um teir persónar, sum vóru í uppskoti til limir í Etiska ráðið, høvdu neyðugu førleikarnar.

Við gjøgnumgongd av skjølunum í málinum, har nýtt Etiskt ráð var sett á heysti 2022, undraðist eg yvir fyrisitingarligu mannagongdina hjá Heilsumálaráðnum. Eg bað tí Heilsumálaráðið greiða mær frá:

- Hví Heilsumálaráðið ikki hevði biðið teir ymisku partarnar, sum skuldu koma við tilmælum um limir til Etiska ráðið, lýsa, hvørjar førleikar teir persónar, sum vóru skotnir upp, høvdu til júst hesa uppgávuna.

- Hví tilmælið frá umsitingini í Heilsumálaráðnum til landsstýrismannin í heilsumálum ikki ráðgav landsstýrismannin um, hvørjir av persónunum, sum vóru skotnir upp, vóru best skikkaðir at sita í Etiska ráðnum, og við hvørjum persónum Etiska ráðið best hóskandi varð samansett.

- Hví upprit frá fundi við landsstýrismannin í heilsumálum onga grundgeving hevði fyri, hví landsstýrismaðurin valdi júst hesar limirnar í Etiska ráðið, og hví Etiska ráðið var samansett júst soleiðis, sum tað var.

Heilsumálaráðið skrivar í frágreiðing til mín, at ongin almennur politikkur ella fyrisitingarligar mannagongdir eru galdandi, tá ið ráð og nevndir skulu setast av landsstýrinum. Heilsumálaráðið hevur ikki havt til siðvenju og metir tað ikki vera rætt at fylgja setanarpolitikki landsstýrisins og teimum fyrisitingarligu mannagongdum, sum har eru orðaðar, tá ið ráð og

nevndir skulu setast. Ráðið hevur tí ikki biðið um t.d. grundgevingar, lívsrensl og/ella havt samrøður við tey, sum eru tilnevnd í Etiska ráðið, fyri at koma við einum tilmæli um, hvønn Heilsumálaráðið metir er best skikkaður til at sita í ráðnum. Heilsumálaráðið vísir á, at endamálið við setanarpolitikkinum er m.a. at tryggja, at stovnurin setir umsøkjara, ið, úr einum heildarsjónarmiði, er best egnaður til starvið. Setanarpolitikkurin skal eisini tryggja, at umsøkjarar, sum ikki fáa starv, kunnu vera vísir í, at avgerðin er farin fram á rættan og rættvísan hátt.

*Eg eri samd við Heilsumálaráðið í, at talan ikki er um starvssetan, tá limir verða valdir til ráð og nevndir. Eg skal tó viðmerkja, at hóast tilnevningin av limum til ráð og nevndir ikki eru at meta sum starvssetan, so eigur tilnevnandi myndugleikin at tryggja sær, at tey sum verða vald í ráð og nevndir hava neyðugu førleikarnar at greiða uppgávuna og at skjalprógva hetta, soleiðis at almenningurin kann vera vísur í, at tilnevningin er farin fram á rættan og sakligan hátt.*

Heilsumálaráðið skrivar í frágreiðingini til mín, at ráðið sendi skriv til teir ymisku partarnar um at koma við tilmæli um val av limum til Etiska ráðið, har Heilsumálaráðið gjørdi partarnar varugar við, at tey, ið verða tilnevnd í Etiska ráðið, skulu hava innlit í etisk, mentanarlig, samfelagslig og faklig viðurskifti, ið hava týdning fyri ráðsins virki, og at Etiska ráðið hevur til endamáls at fremja og styrkja kjak og vitan um etiskar spurningar, ið knýta seg til heilsufakligt virksemi á heilsuøkinum, almannaøkinum og kommunala økinum. Heilsumálaráðið metir, at teir ymisku partarnir, ið komu við tilmæli um limir til Etiska ráðið, vóru greiðir yvir, at persónarnir í uppskoti skuldu hava ávísar førleikar. Tí bað Heilsumálaráðið ikki um nærri grundgeving fyri, hví júst hesir persónar vóru í uppskoti.

*Eg skal vísa á, at serligu viðmerkingarnar til § 6 í lógini um Etiskt ráð hava rættuliga nágreinilig dømi um, hvørjar førleikar limirnir í Etiska ráðnum skulu hava. Tað hevði tí verið natúrligt, at Heilsumálaráðið bað tilmælandi partarnar um at lýsa førleikarnar hjá teimum persónum, sum vóru í uppskoti til Etiska ráðið, so sum útbúgvingar, royndir og innlit og luttøku í almennum kjaki viðvíkjandi etiskum spurningum, soleiðis at Heilsumálaráðið og landsstýrismaðurin kundu skjalprógva, at tey, sum vóru í uppskoti høvdu neyðugu førleikarnir.*

*Í serligu viðmerkingunum til § 6 stendur m.a., at um landsstýrismaðurin ikki fær ráðið samansett við nóg fjølbroyttum førleikum, ber til hjá landsstýrismanninum, við heimild í § 6, stk. 4 (eigur helst at vera § 6, stk. 5, mín viðmerking), at venda sær aftur til tey, ið skulu tilmæla limir í ráðið við umbøn um, at (annar, mín viðmerking) limur verður tilmæltur, soleiðis at hesin trupulleiki kann verða loystur. Eg haldi, at við hesi orðing er undirskilt, at tey, sum tilmæla limir í Etiska ráðið, mugu lýsa førleikarnar hjá teimum tilmæltu, fyri at landsstýrismaðurin kann taka støðu til, um ráðið verður samansett við nóg fjølbroyttum førleikum.*

Heilsumálaráðið vísir á í frágreiðingini til mín, at tað sambært lóggávuni er landsstýrismaðurin í heilsumálum, sum setur Etiska ráðið, og at ráðið ikki hevur havt til siðvenju at ráðgeva

landsstýrismanninum í, hvørjar persónar hann ítøkiliga skal velja, fyri at Etiska ráðið verður best hóskandi samansett.

*Eg skal vísa á, at hóast tað er landsstýrismaðurin, ið tekur avgerð um, hvørjir persónar skulu manna Etiska ráðið, so merkir tað ikki, at umsitingin ikki kundi gjørt eina innstilling til landsstýrismannin.*

*Eg haldi, at umsitingin á Heilsumálaráðnum átti at havt sæð til, at førleikarnar hjá tilmæltu limunum til Etiska ráðið vórðu lýstir, soleiðis at landsstýrismaðurin kundi vera vísur í, at hann tryggjaði eina fjølbroytta umboðan av førleikum í Etiska ráðnum. Umsitingin kundi t.d. flokkað teir einstøku persónarnar, sum vóru í uppskoti, soleiðis at landsstýrismaðurin kundi tikið avgerð sína á upplýstum grundarlagi.*

*Eg haldi, at vantandi málsupplýsingin frá umsitingini økir um vandan fyri, at limirnir ikki verða valdir út frá sakligum atlitum, at Etiska ráðið ikki verður samansett við nóg fjølbroyttum førleikum, og at landsstýrismaðurin harvið ikki heldur seg innanfyri Løgtingsins vilja.*

Heilsumálaráðið upplýsir í frágreiðingini til mín, at ráðið ikki metti tað vera neyðugt, at landsstýrismaðurin í uppriti skuldi grundgeva fyri, hví hann valdi júst teir limir, sum hann valdi, og hví Etiska ráðið bleiv samansett júst soleiðis, sum tað bleiv. Heilsumálaráðið vísir á, at landsstýrismaðurin sjálvur avger, hvørjar limir hann velur út frá teimum innkomnu tilmælunum, og tað ongastaðni stendur í lógini um Etiska ráðið, at landsstýrismaðurin skal grundgeva fyri sínum vali.

*Eg skal vísa á, at í serligu viðmerkingunum til § 6 stendur, at landsstýrismaðurin skal tryggja, at ráðið verður samansett við fjølbroyttum útbúgvingum og royndum, og at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðaðir í ráðnum.*

*Eg haldi, tað hevði verið góður fyrisitingarsiður, um landsstýrismaðurin í einum uppriti hevði grundgivið fyri, hví Etiska ráðið bleiv samansett við júst hesum limunum. Við einum slíkum uppriti kundi verði skjalprógvað, at teir limir, sum landsstýrismaðurin hevði valt í Etiska ráðið, vórðu valdir út frá sakligum atlitum og høvdu teir førleikar, sum lógin um Etiskt ráð krevur, og at Etiska ráðið hevur tað fjølbroytni, sum lóggávan krevur. Eitt slíkt upprit hevði givið gjøgnumskygni fyri valinum hjá landsstýrismanninum, møguleika fyri at hava eftirlit við fyrisitingini og verið við til at styrkt álitið á fyrisitingina millum manna.*

**Samanumtikið**
Samanumtikið haldi eg tað ikki vera nøktandi fyrisitingarliga mannagongd og ikki í samsvari við góðan fyrisitingarsið, at Heilsumálaráðið lat vera við at biðja tilmælandi partarnar um at lýsa førleikarnar, sambært § 6 í lógini um Etiskt ráð og viðmerkingarnar til ásetingina, hjá teimum persónum, sum teir skutu upp til limir í Etiska ráðið. Eg haldi tað heldur ikki vera nøktandi ella í samsvari við góðan fyrisitingarsið, at tilmælið frá umsitingini ikki var soleiðis

háttað, at landsstýrismaðurin kundi taka avgerð sína á upplýstum grundarlagi, og at einki skjalprógv var fyri, hví landsstýrismaðurin valdi at samanseta Etiska ráðið 2022-2026 júst soleiðis, sum tað var.

Eg fari tí at mæla Heilsumálaráðnum til, tá Etiskt ráð hereftir skal setast, at biðja tilmælandi partarnar um at lýsa útbúgvingar og royndir hjá teimum persónum, sum verða skotnir upp til limir í Etiska ráðið. Tilmælini eiga at lýsa, í hvønn mun teir hava innlit í etisk, mentanarlig, samfelagslig og faklig viðurskifti, herundir átrúnaðarlig viðurskifti, ið hava týdning fyri ráðsins virki, og í hvønn mun, teir hava luttikið alment í kjakinum viðvíkjandi etiskum spurningum.

Eg fari eisini at mæla til, at Heilsumálaráðið tryggjar, at landsstýrismaðurin tekur avgerð sína á upplýstum grundarlagi, og at hetta sæst aftur í uppriti viðvíkjandi valinum av limum til Etiska ráðið.

Burtursæð frá omanfyristandandi viðmerkingum og tilmælum geri eg ikki meira við málið.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður